# Skemt



## Stuttligir skógvar

Skógvamóti kann vera so mangt, og vit mugu viðurkenna, at vit gjøgnum árini hava sæð nógvar serstakliga ivasamar skógvar á gøtunum. Men hvat við at fara allan vegin og fáa sær onkrar heilt øðrvísi skógvar. Her eru nøkur dømi um, hvat tað kundi verið.




## Fara illa við fangum

Spurningurin er, um Sosialurin farna vikuskifti avdúkaði illgrunasom viðurskifti í Vestre Fængsel í Keypmannahavn. Í reportasju úr fongslinum stendur at lesa, at fangarnir verða vaktir klokkan 7 um morgunin, og morgunmat fáa teir kl. 17.15. Vit halda, at hetta er at fara illa við fangum. At purra teir út so tíðliga og lata teir bíða so leingi eftir morgunmatinum. Kanska eitt mál fyri Amnesty.

## Í RANGASTRÚPAN

**Næsti!**
Eik vildi hava 2 milliardir frá landsstýrinum
*Kringvarp.fo*

**Stórur konvoluttur**
Vit hava savnað øll tey, sum hava tippað rætt, í ein konvolut.
*Bólturin í ÚF*

**Hvat merkir tað?**
Kirsiberjagarðurin stóran píl uppeftir
*Dimma*

**Uha, uha, løgmaður kemur!**
Kappingarráðið hóttir við bót og løgmanni
*Kringvarp.fo*

**Óreinur dómari**
Vit hava ein fanga nú, sum júst er innsettur fyri 38. ferð fyri júst sama brot
*Sosialurin*

**Nýtt, nýtt!**
Norðurlendsk vælferð kostar
*Dimma*

**Hvar byrjar køin?**
Sarkozy fær frammaná frá veljarunum
*Kringvarp.fo*

**Melda løgregluna!**
Løgreglan tekur nummarspjøldur
*Kringvarp.fo*

**Hann fór alt ov tíðliga**
Nenad er farin
*Dimma*

**Tað er eitt undur!**
Jesus er klaksvíkingur
*Portal.fo*

UMAFTURAFTURUM
HØGNI DJURHUUS



# Makrelguff

Løgið, at so nógv stríð og so nógvur rumbul, ja, næstan kríggj, kann standast av einum fiski, sum smakkar so út av lagi illa. Bart út verri enn tramin, sum tó kann etast, bara hann er saltaður og kókaður tíggju minuttir.

Makrelur er bara snik og bein. Ófatiligt, at hesin pussupp-sjóvarfiskur er so væl umtóktur og hevur so góðan prís.

Og tó, hann kann við neyð og deyð etast, er hann doyvdur í tomatsós, fifty-fifty minst, við majonesu omaná. Men bara eitt blikk á 125 gramm í senn, annars ført tú vaml fyri lívið.

(Og nú til okkurt heilt annað eina løtu: fanin, sum tær eru argiligar, orðabøkur, sum vísa til eitt annað orð, tá tú endiliga hevur funnið orðið, leitað varð eftir.

Havi eitt dømi beint her og nú. Majonesa, nú veit eg, hvussu tað stavast á føroyskum. Men hvussu stavast hetta eggjasvansið á donskum? Giti meg fram til, at orðið byrjar við may, og so at leita. Jú, mín sann, á síðu 701, millum mayday og mazarin, millum altjóða útvarpsneyðarkall og turra køku úr mandludeiggi, stendur mayonnaise. Og so! sí majonæse. Álvaratos! Aftur at leita og vit enda á blaðsíðu 687, sí síðu 687. Majonæse er eggjasós ella, ja, majonesa.)

Og so aftur til makrelin. Sera umráðandi er at fáa makrel seldan til matna, til fólk at eta. Tí hann kann ikki brúkast til alifóður.

Eingin alilaksur við virðing fyri sær sjálvum vil nerta við fóður, sum er malið úr makreli. Heldur svimja svangur enn eta slíkt junkfood.

Makrelur sigst tó vera hollur kostur. Og tað vita vit, alt, sum er heilsugott, smakkar illa.

Teir, sum fiska makrelin, hava tíbetur ráð til at keypa sær tann besta búffin. Teir eta ikki makrel.

Hóast makrelur er óetandi, eru nógvar uppskriftir, har sum makrelur er høvuðstilfarið. Men sum oftast skal nógv afturat, krútsterkt krydd til dømis, so makrelsmakkurin hvørvur. Ella ein snapsur afturvið.

Tað er eisini vanligt at roykja makrel fyri at sleppa av við smakkin.

Fyrr ótu fólk ikki makrel, tí tey søgdu, hann var líkfiskur. Nógvur makrelur var, og er ivaleyst enn, har sum skip eru sokkin við fólki. Slíkar vátar gravir eru góð makrelmið.

Nei, tosa ikki ljótt um makrelin, tí nú er hann álitið. Álitið hjá nótaskipum og hjá trolarum í Barentshavinum, hjá sjey skipum. Tí svartkjaftur, sum eingin vil vita av, er kortini niðurfiskaður, og sildin er næstan við at hvørva sum tá í trýssunum, áðrenn fiskifrøðin varð uppfunnin.

So, ikki eitt ljótt orð um makrelin, ikki eitt afturat.

Aðrir fiskar eru eisini, sum til ber at spilla út. Danir, uppruna-ligir og nýggir, leita sínar ljótastu eiðir á ymsum málum fram, tá danskir ríkisborgarar føddir í Føroyum kóka ræstan fisk í gettoini við Oyrasund. Tað er ikki populert, men hann smakkur betur enn hann rýkur.

Delikatessa ella ikki, nú er makrelurin álitið hjá tveimum skipabólkum, teimum, sum for-vinna mest av øllum, har sum skattaløttu hýrurnar eru størstar.

Í mesta lagi 96.900 tons skulu býtast millum teirra, og okkurt um 200 onnur skip, sum eisini siga seg hava sjálvsagdan og søguligan (fiskiskapur í tveir mánaðir) rætt til hesa fólksins ogn.

Tað verður eitt veðurlags-broytt heyst.

Kanska kunnu vit bjóða Russlandi eitt grundstykki uppi í fjøllunum til herstøð aftur fyri tosk. Mafian er ikki so ring sum kommunisman var.

Eg sigi fyri meg, eg skal ongan makrel hava, annars takk fyri.